

# *Málfrøðingur*
### *til Føroyamálsdeildina*

Treytað av játtan á fíggjarlógini fyri 2008 er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í føroyskum máli leyst at søkja á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum. Starvið verður sett sum lektarastarv, sum skal virka fyri at menna gransking, útbúgving og undirvísing í føroyskum máli fyri útlendingar.

Granskingin í starvinum verður knýtt at serøki umsøkjarans. Samstarv innan- og uttansetur er týdningarmikið í starvinum.

Útbúgvingarparturin fevnir í fyrstu atløgu um at skipa fyri námi í føroyskum fyri útlendingar at byrja á heysti 2009. Síðan verður talan um at hava ábyrgdina av náminum og undirvísingini. Um umstøðurnar broytast, kann tann, sum sett/ur verður, fáa aðrar uppgávur at røkja á starvsøki deildarinnar.

Talan er um fast lektarastarv. Umsøkjarar eiga at skjalprógva vísindaligan førleika á ph.d.-stigi við at leggja í mesta lagi fimm greinir og ritgerðir við umsóknini, harumframt leggja við ummæli um pedagogiskan førleika og lýsing av umsitingarligum royndum.

Sett verður ein metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi metingina um sínar førleikar.

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Maluna Marnersdóttur, megindeildarráðsleiðara, á teldupostadressu *malanm@setur.fo.*

Starvið verður sett frá 1. august 2008 ella skjótast gjørligt. Umsóknir við ævilýsing (curriculum vitae) og útgávulista, avritum av próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, serprentum og avritum av vísindaligum ritgerðum (í fýra eintøkum) verða send til adressuna niðanfyri.

**Umsóknarfreistin er 2. juni 2008.**

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan · Postsmoga 272 · FO 110 Tórshavn

SENDISTOVAN

Føroyamálsdeildin (FMD) á Fróðskaparsetrinum skipar fyri Bachelor of Art- (BA) og Master of Art- (MA) útbúgvingum í føroyskum, sí ***http://setur.fo/fo/foeroyamalsdeild/.*** Í serstøkum førum ber til at taka ph.d.-útbúgving. Á deildini starvast sjey granskarar, ein skrivari og tríggir granskingarhjálparar, umframt uttansetursundirvísarar. Á FMD eru fleiri málfrøðilig søvn, kvæða- og frásagnarsavn, umframt brøv og skjøl eftir granskarar og rithøvundar. Granskararnir á FMD taka lut í granskingarverkætlanum í samstarvi við aðrar stovnar og við granskarar innan- og uttanlands.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Tekniski Skúlin Klaksvík

# Undirvísari til Maskinøkið

Vit leita eftir undirvísara at byrja skjótast tilber.

**Vit kundu hugsað okkum**
- at tær dámar at undirvísa,
- hevur sveinabræv innan maskinyrkið
- tað er ein fyrimunur um tú hevur víðari útbúgving.

**Setanartreytir o.a.**
Setanartreytir eru eftir sáttmála í millum FTL og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast skúlanum innan 25. apríl.

Eru spurningar, so eru áhugaði vælkomin at venda sær til John Erik Hansen, deildarleiðara ella Rúna Heinesen, skúlastjóra, tlf. 456311 ella fartelefon 214407.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20
FO-700 Klaksvík
www.tsk.fo

**Tekniski Skúlin í Klaksvík** er sjálvognarstovnur og yrkisskúli. Á skúlanum eru miðnámsútbúgvingarnar, HT og SIT, og skúlagongd fyri handverkslærlingum innan el-, maskin- og timbur yrki. Aðalmál skúlans er, at vera kendur fyri eitt gott skúlaumhvørvi og fakliga og námsfrøðiliga menning.

**Sjúkrakassin er stongdur frá 24/4-08 til 30/4-08, báðir dagar íroknaðir.**

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**

## Aðalfundur

Áður lýsti aðalfundur hjá Vestmanna Fiskavirking tann 5. mai kl. 17.30 verður avlýstur. Ístaðin verður fundurin í hølum felagsins tann 6. mai 2008 kl. 17.30.

Skrá sambært grein 6 og broyting av grein 3. Hækking av partapeningi við 3,5 mió., frá 1 mió. til 4,5 mió.

**Nevndin**

Lesið
**Sosialin**
-so eru tit við!

# Frá Eiðis skúla og Eiðis kvøldskúla

Framsýning av næmingaarbeiði verður í skúlanum flaggdagin frá kl. 15.00 til kl. 18.00.

**Eiðis Skúli**

# Bilur til Sølu

Nissan Almera 2,2 Diesel
frá januar 2002
koyrt 250.000 km.



**Ring 284444**



# Motorsúkkla

Suzuki SV1000, maj 2007, 1400 km, sera væl hildin, til sølu fyri kr. 90.000.

**Ring ella send SMS til 541235**